# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Dávaslagið hevur ættarstevnustevnu



**Tann 18 august hevur Dávaslagið ættarstevnu. Eftirkomararnir hjá Gamla Dáva í Sørvági fara at skipa fyri ættarstevnu í Vágum tann 18. august í ár**

TÍÐINDASKRIV

Eini 15 fólk hava í langa tíð fyrireikað hesa stevnu. Tey hava roknað seg fram til, at o.u. 2000 fólk hoyra til ættina, og tey vilja fegin, at so nógv, sum gjørligt, kunnu hittast á stevnuni. Mest sum øll ættartalvan er skrivað og útgreinað.

Sum tað sæst niðanfyri, er ikki so løgið, at ættin er vorðin so stór. Gamli Dávur var tvær ferðir giftur. Fyrra konan var Marin Elisabeth Davidsen, og fingu tey dóttrina Elspu, vanliga nevnd Dáva Elspa, sum búsettist á Slættanesi.

Dáva Elspa átti 8 børn, og 3 hava eftirkomarar. Seinna kona Gamla Dáva var Ada Maria, og fingu tey 9 børn: Dáva Rasmus í Sørvági, átti 11 børn, og 7 hava eftirkomarar, Catrina Maria í Sandavági, átti 7 børn og 6 hava eftirkomarar, Marin Elisabeth í Miðvági, átti 6 børn og 4 hava eftirkomarar, Dáva Jóhanna í Sørvági, átti 4 børn og 3 hava eftirkomarar, Lítli Dávur í Sørvági, átti 4 børn og 3 av hava eftirkomarar, Niels Jacob (doyði fýra ára gamal), Dáva Lisa í Sandavági, átti 3 børn og 2 av hava eftirkomarar, Dáva Nicolina í Sørvági, átti 4 børn og 3 hava eftirkomarar, Dáva Andrias í Sørvági, átti 5 børn og 2 hava eftirkomarar.

Tey, sum vilja vita meira um ættarstevnuna, kunnu seta seg í samband við onkran av fyrireikarunum. Tey hava býtt seg sundur soleiðis, at ein varðar av hvørjum av børnunum, og tey, sum halda seg hoyra til eina ávísa grein, kunnu seta seg í samband við kontaktpersónin fyri ta greinina.

*Dáva Elspa*
*Sonni Nielsen*
*sonie@kallnet.fo*
*333486/533486*

*Dáva Dánial*
*Maud Ørvarodd*
*oddmar@post.olivant.fo*
*332762/267962*

*Lítli Andrias*
*Ásbjørg Davidsen*
*asda@email.fo*
*332235/532235*

*Hans Niklái*
*Lív Vilhelmsen*
*liv.vilhelmsen@skulin.fo*
*212530*

*Dáva Palli*
*Ruborg Zachariassen*
*rz1319@post.olivant.fo*
*332192*

*Dáva Martina*
*Eiley Weihe*
*weihe-e@post.olivant.fo*
*332246/212246*

*Katrina Maria*
*Andrea Nielsen*
*joanis@post.olivant.fo*
*333361/282361*

*Marin Elisabeth*
*Jóhannes Dam Hansen*
*bjork@post.olivant.fo*
*332576/228176*

*Marin Elisabeth*
*Dagbjørn Hansen*
*bjork@post.olivant.fo*
*333210/217421*

*Dáva Jóhanna*
*Valdemar Simonsen*
*vs@post.olivant.fo*
*214251/332861*

*Lítli Dávur*
*Dagmar Leonsson*
*dagmarleonsson@kallnet.fo*
*333118*

*Dáva Lisa*
*Eydna Gregersen*
*eydna.gregersen@luna.fo*
*210916/333245*

*Dáva Marius*
*Nancy og Marius Davidsen*
*marius@atlantic.fo*
*333262/213703*

*Dáva Nicolina*
*Niels Nielsen*
*nielsj@post.olivant.fo*
*332345*

*Dáva Andrias*
*Dorit Simonsen*
*dorit@post.olivant.fo*
*333072/213072*

Hevur onkur okkurt serligt ynski í samband við dagin ella okkurt serligt hugskot til fyrireikararnar, eru tey hjartaliga vælkomin at skriva til: dorit@post.olivant.fo

Skrá fyri stevnuna hjá Dávaættini í Vágum 18. august 2007.

Klokkan 12.00: Vælkomin og ábit í Høllini í Sørvágs skúla, kunning um ættina, myndaframsýning og gongutúrur í bygdini.

Klokkan 19.00: Veitsla í Ítróttarhøllini á Giljanesi, døgurði við trimum rættum, dansur, kaffi køkur og morgunmatur.

Kostnaður uttan drykkjuvørur: vaksin kr. 300,- og børn undir 12 ár kr. 150,-. Tilmelding við at gjalda á konto 6460-175.378.0 áðrenn 18. juli 2007. Møguleiki verður at keypa fløgu ella bókling um ættina.

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Jarðarferðin hjá Svenningi Jacobsen**, ættaður úr Mykinesi, búsitandi í Havn, verður úr Kirkjugarðskapellinum hósdagin klokkan 13.

---

†

Hervið verður gjørt kunnugt fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, svigarmamma, omma, svigaromma og langomma okkara

**Jastrid Olsen**
vanliga nevnd Jastrid á Toft
ættað úr Dali, búsitandi á Bornholm

andaðist í heiminum sunnudagin 8. juli, 83 ára gomul.

*Familjunnar vegna*
**Maj-Brit og Erik**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri bróðir og svágur okkara

**Angus Napoleon Olsson**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til talarar, sangarar, urguspælara og berarar.
Ein serstøk tøkk til heimarøktina og starvsfólk á B7 og 8.
Tøkk fyri uppringingar, blómur og kransar.
Tøkk tit øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.
Tøkk til tær, ið hjálptu til við ervið.

*Vegna familjuna*
**Jasstrid, Ruth og Moody**

---

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt heiðraðu okkum á 85 og 80 ára døgum okkara.

*Bestu heilsanir*
**Poulina og Leivur**